# Høgni Øster varð nummar 10741



**SÚKKLING** Heimsins størsta fjallasúkklukapping var fyri kortum, og Høgni Øster kom á málið sum nummar 10741, sum rakk til eitt 1919 pláss av 2256 í sínum aldursbólki

Uni Holm Johannesen

Tað vóru ikki allir luttakararnir, sum komu á málið.

Veðrið var buldrasligt, og fleiri valdu at gevast.

18.000 súkklarar høvdu boðað frá luttøku í alt. Umframt Høgna Øster, so var Sigmund Olsson eisini við, men hann valdi at gevast.

Heimsins størsta fjallasúkklukapping, Birkebeinerrittet, var í Noregi. Tað eru luttakarar úr 38 ymsum londum, og úr øllum heimspørtum.

Teinurin, sum verður súkklaður, er 94 kilometrar, úr Rena til Lillehammer.

Tað er eisini ein longri teinur á gott og væl 114 kilometrar, sum fleiri valdu í ár. Høgni Øster royndi seg á hesum teininum.

*uni@sosialurin.fo*

## 1. DEILD MENN

**HB II – EB/STR** 3-4 (1-3)
Dómari: Rói Jacobsen
0-1: Hallur E. Fláaberg, 9.
0-2: Bjarni Jørgensen, 29.
1-2: Tórður Hentze, 31.
1-3: Jonn S. Thomsen, sjálvmál, 45.
2-3: Jógvan Andrias Nolsøe, 79.
2-4: Kristoffur Jakobsen, 83.
3-4: Óli Arge, 90.

**07V – NSÍ** 4-0 (2-0)
Dómari: Rúni Gaardo
1-0: Eli Falkvard Nielsen, 21.
2-0: Jens Erik Rasmussen, 32.
3-0: Johan Ejvind Mouritsen, 59.
4-0: Høgni Djurhuus, 77.

**TB – AB II** 2-0 (1-0)
Dómari: Alex Troleis
1-0: Rógvi Joensen, 29.
2-0: Dan Mortensen, 73.

**VÍK II – B68 II** 2-1 (0-1)
Dómari: Bent Tommy Linklett
0-1: Eli Simonsen, 36.
1-1: Eli Simonsen, sjálvmál, 77.
2-1: Andras Mikkelsen, 86.

**FCH – KÍ 0**-3 (0-0)
Dómari: Johan Petur Michelsen
0-1: Steffan Kalsø, 54.
0-2: Tórður Lervig, 70.
0-3: Álvur F. Christiansen, 73.



# TB rennur aftaná

**1. DEILD MENN** Oddurin í næstbestu deildini er íbroyttur aftaná vikuskiftið. TB rennur framvegis aftaná

Uni Holm Johannesen

Ovastu liðini í næstbestu deildini greiddu sína skyldu um vikuskiftið.

07 Vestur, KÍ og TB vunnu sínar dystir, og tí er støðan óbroytt í oddinum. Tvørámenn bíða framvegis eftir at hini liðini tapa stig.

TB vann greitt og uppiborið á heimavølli móti næstbesta liðnum hjá AB.

– Um KÍ og 07 Vestur ganga og halda, at teir kunnu nú lækka ferðina í oddastríðnum, so mugu teir hugsa seg betur um, tí vit ætla at taka ein øgiligan endaspurt, sigur Jón Johannesen, venjari hjá TB, við heimasíðuna hjá tvørámonnum.



### Ein dyst fleiri

TB hevur 42 stig í løtuni. Tað eru trý færri enn 07 Vestur, sum er fremst, og eitt færri enn KÍ, sum er nummar tvey.

TB hevur hinvegin spælt ein dyst fleiri enn ovastu liðini. TB hevur tí ikki beina kós móti bestu deildini, men tvørámenn mugu dúva uppá, at hini liðini snáva.

– Eg velji at síggja bjart upp á støðuna, og eg eri sera spentur at síggja TB-liðið, sum er við at verða skapt í løtuni. Stamman er sera ung, og evnini eru av teimum avgjørt bestu. Gamaní fara vit at missa ávísar leikarar, men støðuga sterka tilgongdin av yngri leikarum, tryggjar eitt høgt botnstøði, so tað sær av sonnum spennandi út, sigur Jón Johannesen við heimasíðuna hjá TB.

### Hini vunnu

07 Vestur vann 4-0 á heimavølli móti næstbesta liðnum hjá NSÍ. 42 ára gamli Jens Erik Rasmussen var ein av málskjúttunum. Hann hevur skotið 10 mál í hesum kappingarárinum.

KÍ vann 3-0 á útivølli móti FC Hoyvík. Steffan Kalsø, Tórður Lervig og Álvur F. Christiansen stóðu fyri málunum.

### Aftur favorittur

Tað er lítið, sum bendir á, at oddaliðini fara at snáva komandi vikuskiftið.

TB hevur avgreitt sín dyst í 22. umfari, og tí hava tvørámenn frí.

07 Vestur vitjar hjá FC Hoyvík, og KÍ vitjar hjá næstbesta liðnum hjá AB.

Hini dystirnir eru NSÍ II – Víkingur II, og EB/Streymur II – B68 II.

*uni@sosialurin.fo*

**Føroyska 1. Deild *menn***

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 07 Vestur | 21 | 13 | 6 | 2 | 52 | 20 | +32 | 45 |
| 2 | KÍ | 21 | 13 | 4 | 4 | 52 | 19 | +33 | 43 |
| 3 | TB | 22 | 13 | 3 | 6 | 48 | 25 | +23 | 42 |
| 4 | EB/Streymur II | 21 | 10 | 5 | 6 | 45 | 32 | +13 | 35 |
| 5 | HB II | 22 | 10 | 3 | 9 | 46 | 48 | -2 | 33 |
| 6 | Víkingur II | 21 | 8 | 4 | 9 | 32 | 41 | -9 | 28 |
| 7 | NSÍ II | 21 | 6 | 7 | 8 | 29 | 42 | -13 | 25 |
| 8 | AB II | 21 | 7 | 2 | 12 | 25 | 47 | -22 | 23 |
| 9 | FC Hoyvík | 21 | 5 | 5 | 11 | 26 | 40 | -14 | 20 |
| 10 | B68 II | 21 | 0 | 3 | 18 | 13 | 54 | -41 | 3 |